# Pedagogar ella hjálparfólk

## til Bústovnin á Eirargarði 16ABN í Havn

Innan Trivnaðarmálaráðið og stovnar undir tí, við tænastu inntil víðari á Bústovninum á Eirargarði 16ABN er eitt pedagogstarv leyst til setan 1. september 2002 ella eftir nærri avtalu.

Starvið er tænastumannastarv, sett eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag, lønt lønarstigini 24, 25, 27, 28, 30 og 31 eftir lønartalvuni frá mars 2002. Arbeiðstíðin verður inntil víðari 75 prosent av fullari tíð.

Á bústovninum búgva 15 menningartarnað fólk, nøkur við likamligum brekum eisini. Dentur verður lagdur á at tann, sum settur verður, er likamliga væl fyri, er áhugaður at luttaka aktivt í øllum avbjóðingum og er opin fyri nýhugsan. Harafturat er neyðugt at arbeiða sjálvstøðugt, at samstarva við onnur, umframt at vera førur fyri at taka ábyrgd og avgerðir í arbeiðinum.

Bert fólk, sum hevur lokið námsfrøðiligt prógv ella líknandi prógv, kann setast í pedagogstarvið, men um ikki útbúgvið fólk verður sett, verður fólk við øðrum førleika sett í tíðaravmarkað starv.

Nærri fæst at vita um størvini frá leiðaranum á telefon 315422 ella 315423. Umsóknarfreistin er 15. juli 2002 og skulu umsóknirnar, saman við prógvum, viðmælum v.m. sendast til:

**Bústovnin á Eirargarði 16ABN**
Eirargarður 16ABN
FO-100 Tórshavn

INPACT INTERNATIONAL

## Summarfrí

Vit fara í summarfrí tann 8. juli og koma aftur beint eftir ólavsøku. Tí verður skrivstovan stongd í hesum tíðarskeiði.

**P/F Grannskoðaravirkið INPACT**
statsaut. revisorar
Postrúm 191
110 Tórshavn
telefon: 31 47 00; telefax 31 38 15
t-postur: inpact@post.olivant.fo

**Member of international network of professional accountants**

# Frá Fuglafjarðar býráð

Feløg og einstaklingar, sum hava ætlanir um at nýta fimleikarhøll skúlans vetrarhálvuna 2002–2003, verða biðin um at senda mentamálanevndini skrivliga umsókn í seinasta lagi **hósdagin 15. august 2002 kl. 15.00.**

Fuglafjørður, tann 24. juni 2002
**Fuglafjarðar býráð**

# Skipssnikkari søkist

Søkt verður eftir royndum skipssnikkara, sum kann arbeiða sjálvstøðugt til at byrja í summar.

**Skipstimbur & aptering**
470 Eiði
Tlf. 222386


Brandt
Blomberg
Hvítvørur til føroyska húsarhaldið
Turkitrumla
5 kg av klæðum
Tíðarstýrd til lágan og høgan tempereatur
prísur fyrr 5.395,-
Nú 4.795,-



pf Klement Petersen
Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460



DYNAPAC
-maskinurnar sum halda!



- Asfaltleggjarir
- Plátuvibratorar til asfalt, grús o.a.
- Breitt úrval av stav- og bjálkavibratorum til betong/stoyping
- Glittemaskinur
- Dykpumpur
- Eykalutir

Keyp góðsku – keyp Dynapac!
Sosialurin - 311820
Kaj Andreasen & Co
Heilsøla, smásøla og umboð - Tel. 315600 - Fax 318008


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3383
Navn: Sp/f Skarðið
Adressa: 900 Vágur
Kommuna: Vágs Kommuna
Stovningardato: 24.06.2002
Viðtøkudato: 24.06.2002
Kapitalur: Kr. 270.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 2.000,00 til kurs 100 og kr. 268.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
Stovnarar: Bjarni T. Brattaberg, 900 Vágur, Eyðun Djurhuus, 900 Vágur og Arni D. Brattaberg, 900 Vágur.
Nevnd: Bjarni T. Brattaberg, 900 Vágur (formaður), Eyðun Djurhuus, 900 Vágur og Arni D. Brattaberg, 900 Vágur.
Stjórn: Arni D. Brattaberg, 900 Vágur.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum ella av formanninum í felag við einum nevndarlimi.
Grannskoðari: : Sp/f ADS-grannskoðan, 826 Trongisvágur.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.01.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka fiskivinnu, handil og annað yrki í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 1. juli 2002

Kristin Balle

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3387
Navn: Sp/f 19.06.02.
Adressa: 850 Hvalba
Kommuna: Hvalbiar Kommuna
Stovningardato: 24.06.2002
Viðtøkudato: 24.06.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr.80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Dan Thomsen, 850 Hvalba.
Nevnd: Jógvan Thomsen, 850 Hvalba (formaður), Dan Thomsen, 850 Hvalba og Kirstin Thomsen, 850 Hvalba.
Stjórn: Dan Thomsen, 850 Hvalba.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóra, nevndarformanni ella tveimum nevndarlimum.
Grannskoðari: : Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 24.06.2002 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at keypa og selja partabrøv, at reka handil í samband við fiskivinnu og annað starv í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 1. juli 2002

Kristin Balle


veitst tú ikki tað? Sosialurin



AUTO
-Dag & nátt-
-Alt døgnið-




BENZIN
DIESEL
KIOSK
AUTO
311234



Sosialurin
Lesið Sosialin - tað loysir seg




Fiskimálaráðið
*Skipaeftirlitið*

# Skipaeftirlitsfólk

Skipaeftirlitið søkir hervið eftir einum skipaeftirlitsfólki til setan 1. oktober ella skjótast til ber.

Skipaeftirlitið er skipað sum deild í Fiskimálaráðnum.

**Starvið inniber m.a. hesar uppgávur:**
- at hava um hendi tekniska málsviðgerð innan nautiska- og skipsbyggitekniska eftirlitsøkið við serligum atliti til fiskiskip og ferðamannaskip
- at hava umsjón við teimum løggildaðu klassafeløgunum o. ø. feløgum ella persónum, sum hava myndugleika ella eru góðkendir til at gera tekniskar kanningar v.m.
- at hava eftirlit við skipaútgerð
- at hava eftirlit við arbeiðsumhvørvinum umborð á skipum, undir hesum samstarv við vinnuna og aðrar myndugleikar

**Førleikakrøv:**
- Til starvið krevst viðkomandi útbúgving sum t.d.:
- skipsverkfrøðingur
- verkfrøðingur sum er serkønur innan sjóvinnu
- maskinmeistari við víðkaðum maskinmeistaraprógvi og sjóvinnubrævi sum skipsmaskinstjóri
- góð evni at samskifta á føroyskum, norðurlendskum og enskum máli
- góðan førleika at arbeiða sjálvstøðugt
- góð samstarvsevni

Tað er somuleiðis krav, at umsøkjarin hevur minst 5 ára starvsroyndir.

Fyrimunur er, um umsøkjari hevur kunnleika til góðskustýring (kvalitetsstýring).

Í starvinum er møguleiki at fáa eftirútbúgving innan viðkomandi arbeiðsøki og verður sett sum eitt krav, um hetta ikki er lokið.

**Setanartreytir:**
Starvið verður lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini aðalstýrini og Løgmansskrivstovuna. Tænastustaðurin í løtuni er Skipaeftirlitið í Miðvági.

Tann, ið settur verður, má tí kunna tola broytingar í starvinum, og at økið verður umskipað til eisini at fevna um aðrar uppgávur í Fiskimálaráðnum.

**Umsóknir:**
Umsóknir saman við avriti av prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Skipaeftirlitinum í hendi í seinasta lagi 1. august 2002, kl. 15.30.

Umsóknir skulu sendast til:

**Skipaeftirlitið**
Postsmoga 112
110 Tórshavn

Fyrispurningar viðvíkjandi starvinum fáast við at ringja til Skipaeftirlitið á tlf. 355600 og tosa við Óla Hans Hammer Olsen, deildarstjóra.


FAROE LAW
Bjóðar heimligar og altjóða loysnir

Tosið við
Eyðfinn Jacobsen,
advokat
ella
Kára á Rógvi,
adv. fulltrúa
um tygara tørv

Tinghúsvegur 14,4
P.O.Box 1218
FO-110 Tórshavn
tel 359900 · fax 359901
mob 219902
dania@post.olivant.fo
www.faroe-law.fo


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 794, Sp/f Faroe Group Ltd., 100 Tórshavn.

Stjórn:
Innkomin sum stjóri: Sjúrður Gorm Flemming Petersen, Brattabrekka 17, 100 Tórshavn.
Nevnd:
Innkomin í nevndina: Liljan Kára Sofía Thomsen, Fútalág 15, 100 Tórshavn (formaður) og Sjúrður Gorm Flemming Petersen, Brattabrekka 17, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 27. juni 2002

Kristin Balle




Sverrisgøta 17 • 100-Tórshavn • Tel. 317661



Lesið Sosialin


# Handverkarar

Søkt verður eftir handverkarum at arbeiða innan HVS og smiðjuyrkið í miðstaðarøkinum, Eysturoy og norðoyggjum.

Hevur hetta tín áhuga, ert tú vælkomin at ringja til Hans Jákup, tlf. 228135.

**Reno-Vent Sp/f**
Bakkavegur 12
FO-600 Glyvrar

*Reno-Vent Sp/f er ein miðalstór HVS-fyritøka við nógvum, fjølbroyttum arbeiðsuppgávum kring alt landið.*

# Dagrøktari

søkist til dagrøktina í Oyndarfirði, at byrja 15. august 2002.

Dagrøktarheimið skal vera innrættað barnavinarligt, har rúm er til børnini at spæla í og hóskandi trygt spæliøki uttanfyri.

Lønin er sambært sáttmála við Føroya kommunala Arbeiðsgevarafelag.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja tlf. 44 47 83.

Skrivlig umsókn skal vera Dagrøktini í hendi í seinasta lagi 20. juli 2002.

**Dagrøktarskipanin í Oyndarfirði**
v/ Eriku L. Petersen
690 Oyndarfjørður

# Lærlingur

**Hevur tú hug at útbúgva teg innan rørfakið?**

Vit hava eitt lærupláss leyst at søkja.

Tú kemur at hava høvuðstilknýti til arbeiðspláss okkara á Glyvrum.

Hevur hetta tín áhuga, ert tú vælkomin at ringja til Hans Jákup, tlf. 228135.

**Reno-Vent Sp/f**
Bakkavegur 12
FO-600 Glyvrar

*Reno-Vent Sp/f er ein miðalstór HVS-fyritøka við nógvum, fjølbroyttum arbeiðsuppgávum kring alt landið.*


Sosialurin -tað loysir seg